# Páskaveitsla og føðingardagur

**Kvinnufelagið, sum í síni tíð skapti grundarlag fyri einum "Føroyahúsið" Keypmannahavn, hevur nú 60 ár á baki**

HÁTÍÐARHALD
*Tíðindaskriv*

Páskavikuna ella teir tríggjar gerandisdagarnar í vikuni er kaffistovan stongd og fólk hava páskafrí. Eisini er eitt og annað at seta í stand. Tað er so ymist, hvussu er við tiltøkum um várarnar. Hetta várið hevur verið friðarligt í so máta, men fleiri donsk feløg hava leigað høli hetta tíðarskeiði til skeið , fundir og reseptiónir. Slíkt verður tó ongantíð lagt soleiðis, at okkara virksemi verður órógvað av tí.

- Føroyahúsið liggur væl fyri, er í standi og væl egnað, siga tey er grundin til, at tey fegin vilja lána høli frá okkum, sigur Martin Fjallstein leiðari í húsinum. Óivað munna vit eisini vera sámulig í prísi og hugnaligt er inni.

Føroysk feløg ella stovnar, sum fundast í Keypmannahavn, eru eisini væl komin at spyrja seg fyri hjá okkum. Vit hava høli á 1. hædd bæði til stórar fundir og smáfundir. Eisini er øll vanlig útgerð í húsinum.

2. páskakvøld verður sum vant veitsla við turrum kjøti og nógvum øðrum viðskera. Undir borðhaldinum spælir FUSE og eisini verður harmonikutónleikur. FUSE spælir eisini til dansin, men á midnátt steðga vit á og fáa náttverða. Vit fara eisini upp á gólv.

- Fyrr var hendan veitslan ein av teimum stóru várveitslunum, men nú er hon vorðin ein hugnalig veitsla, sum er tann einasta, har eingin kann koma inn bert til dansin. Tað eldra ættarliðið kann føla seg skúgva til viks, tá ið ungfólk koma seint, og tónleikurin harðnar nógv.

### Kvinnufelagið 60 ár á baki

Føroyska Kvinnufelagið í Keypmannahavn man vera eitt tað elsta føroyska felagið, sum lív er í. Tí síðstu mongu árini hevur felagið skipað fyri einum hópin av góðum fyrilestrum, kvøldsetum og útferðum. Í síni tíð skapti felagið grundarlag fyri einum føroyskum húsið í Keypmannahavn og fekk stovnað ein grunn til at keypa og reka eini føroysk hús. Kvinnufelagið er tí føddur limur í starvsnevndini hjá Føroyahúsinum. Tá ið á stóð miðskeiðis í níti árunum, vóru kvinnurnar aftur fúsar at rætta húsinum eina hond tvørtur um óslættan.

Týsdagin 13. apríl verður felagið 60 ár. Føðingardagurin verður hildin við reseptión í Føroyahúsinum seinnapartin. Tær bjóða sneisamat og annað. Eisini verður ymist til gamans: upplestur, kórsangur, tónleikur, talur og fagnaðarrøður. Ein og hvør er sjálvandi væl komin inn á gólvið at fagna teimum hendan dagin.

Týsdag hava vit altíð døgverða, sum fólk tekna seg til. Hetta er vanliga føroyskur døgverðamat av alskyns slag. Vit byrja miðskeiðis í august og halda fram til fyrst í juni mánað. Men týsdagin 13. apríl verður ikki døgverðin, nú kvinnufelagið hevur reseptión.

### Nýggjar tíðir nýggj tøkni

Fólk hittast fegin í Føroyahúsinum bert okkurt er at hittast til. Eitt nú at síggja ymist á stórskíggja. Slík útgerð hevur verið dýr at keypað ella leigað, men nú eru prísirnir lækkaðir og Føroyahúsið kann vera við. Vit hava áður víst fótbóltsdystir og Stjørna eitt kvøld við leigaðari útgerð, men nú kunna vit sjálvir klára hetta. Í mei verður bæði Grand Prix, spennandi fótbóltsdystur og kongligt brúdleyp, sum kunna síggjast á stórskíggja í kaffistovuni. Hendan útgerð er eisini góð til skeiðvirksemi saman við eini farteldu.

### Bingo og lutaseðlar til ískoyti

Vit leiga út til onnur, tá ið hølini eru tøk. So alt frá barnadópi og til ervi verður fyriskipað og borðreitt eftir ynski. Mangir føðingardagar og brúdleyp eru. Og so skeiðvirksemi og fundir afturat. Hetta verður gjørt til tess at útvega nakrar krónur afturat til raksturin. Tað er ikki ókeypis at liggja væl fyri á Vesturbrúgv nærhendis høvuðsbanagarðinum, Vesterport og fleiri góðum hotellum sum Hotel Hebron, First Hotel, Weber og onnur.

Eitt annað ískoyti er bingo og lutaseðlar. Bingofelagið Føroyahúsinum til frama skipar fyri bingokvøldunum. Avlopið verður nýtt til nýggja útgerð av ymsum slag. Tað sísðta bingo í vár verður 20. august. Ta´draga vit eisini lutaseðlarnar, har ikki minni enn tríggir ferðaseðlar eru á. Fyrr árini kundi bingo vera sera gott ískoyti, men hetta er linkað seinnu árini. Tó so har eru altíð eini 50 - 80 fólk á bingo.

Raksturin av Føroyahúsinum liggur um smáar tvær milljónir. Av hesum fær húsið slakar 1,5 millj. yvir føroysku fíggjarlógina. Hetta talið hevur verið javnt vaksandi samsvarandi leiguútreiðslunum, men seinastu tvey fíggjarárini stendur tað í stað. Tann írestandi peningin roynir húsið sjálvt at vinna við tiltøkunum. Húsaleigan við varma liggur um 720.000 kr. Tær føstu lønarútreiðslurnar eru nakað tað sama talið.

### Ólavsøkan út á Bryggjuna

Fleiri føst tiltøk eru, sum vit royna at greiða úr hondum á hvørjum ári: fastalávint fyri børn, grækarismessa, flaggdagur, páskaveitsla, ólavsøka, bókadagur, jólatræ og jólaveitsla. Fyrr tóku feløgini sær av hesum, men meira og meira er nú í hondunum á Føroyahúsinum. hetta er eisini dømi um at fleiri feløg eru linkað.

Hesu ferð hevur húsið heitt á feløgini um saman at skipa fyri ólavsøkuni og royna hetta úti á nýggju Norðbryggjuni á Kristianshavn. Feløgini hava tikið væl undir, so nú verður arbeitt við at finna fram til innihald og møguleikar í hølunum harúti og í kanalunum framvið. Har ber væl til at røgva upp til 1000 metrar. Eisini kann uppvísing og annað vera í hylinum inni við Norðbryggjuna. Á bryggjuni kunna vit skipa fyri tónleiki, sølubúðum og ymiskum til gamans fyri bæði børn og vaksin. Hetta er ein spennandi roynd, sum óiva kann hepnast væl, verður veðrið til vildar. Seinastu árini hevur ólavsøkuveðrið verið av tí allarbesta. Mest sum ov heitt at vera inni.

### Tíðindi og lýsingar frá Føroyahúsinum

Føroyahúsið hevur sína egnu heimasíðu, har eini 90000 fólk hava vitjað tey síðstu tvey árini. Har kann skráin og smátíðindi lesast. Men har eru eisini slóðir til ein hóp av feløgum og stovnum. Eisini hava vit eini 1000 fólk á teldupostlistanum. Hesi fáa teldubræv umleið eina ferð um vikuna, so tey lættari kunna fylgja við tí, sum hendir næstu dagarnar. Ein og hvør kann á heimasíðuni seta seg á teldupostlistan.

- Feløg kunna á hendan hátt fáa lýst um teirra tiltøk. Einasta, sum krevst er, er at tey siga okkum frá. Tað er ein aðaluppgáva hjá Føroyahúsinum at livga og styðja øll tey føroysku feløgini í Danmark. Tað kann bara undra, at fleiri feløg ikki geva hesum møguleika gætur.

Eisini verður eitt lítið hefti við mánaðarskránni og øðrum upplýsingum prentað og sent víða um hvønn mánað. Hetta er kanska frægasta dokumentatiónin fyri, at virksemi er í Føroyahúsinum, sigur leiðarin.

Føroyahúsið ynskir øllum landsmonnum og viðskiftafólki gleðiligar páskir.






# Ferðafólk í øðini inn á Strandferðsluna

**Tá ið Smyril skuldi av Havnini til Suðuroyar fríggjakvøldið, valdaði sannur ruðuleiki á havnarkei. Nógvir óvitar vóru farnir umborð á Smyrli, men foreldrini fingu at vita, at tey sluppu ikki við**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Bjargingarstøðin, sum Smyril misti fyri hálvum øðrum mánað síðani, verður sett í aftur í dag og í morgin og so skuldi trupulleikin verið loystur. Her liggur bjarginarstøðin á keihylinum á Tvøroyri*

Tá ið Smyril skuldi av Havnini til Suðuroyar fríggjakvøldið, stúrdi Strandferðslan fyri, at trupulleikar fóru at stinga seg.

Og rætt fekk hon, tí tað valdaði sannur ruðuleiki á havnarkei, tá ið Smyril skuldi fara.

Bjargingarstøðirnar, sum Smyril av ókendum ørsøkum misti í havið á einum túri ímillum Suðuroynna og Havnina fyri einum góðum mánaða síðani, er enn ikki komin umborð aftur.

Sostatt er ferðafólkatalið við Smyrli avmarkað til 300 fólk inntil bjargingarstøðin er komin umborð aftur.

Og hetta vikuskiftið var eitt stórt vikuskiftið í Suðuroy.

Svimjikapping fyri tey yngru úr øllum landinum var í Vági, umframt at bæði HB og ÍF skuldi suður at sparka.

Og harafturat hava skúlarnir fingið páskafrí.

Sostatt var alla tíðina væntandi, at tað fóru at vera fleiri enn 300 fólk við Smyrli suður hetta fríggjakvøldið.

Og so var.

Manning av Smyrli taldi ferðafólkið, sum kom umborð, men tá ið teljarin vísti 300 fólk, varð noktað fyri at taka fleiri fólk við.

Og tað elvdi til ruðuleika.

– Vit vóru í teirri støðu, at fleiri av okkara børnum, sum vóru heilt niður í 8-9 ára gomul, vóru farin umborð, men at foreldrini, sum skuldu suður við, men sum máttu koyra bilarnar umborð, sluppu ikki við, tí tað var fult, sigur ein av leiðarunum, sum skuldi suður við teimum ungu svimjarunum.

Hann sigur, at hetta førdi til rættiligt álop á Smyrli og fólk trokaðu seg rætt og slætt umborð, uttan at manningin kundi gera nakað. Hann sigur, at hetta førdi til rættiligt álop á Smyrli og fólk trokaðu seg rætt og slætt umborð, uttan at manningin kundi gera nakað.

– Manningin var rættiliga kroyst, tí hon fekk onki gjørt við støðuna, so tað var heilt synd í teimum monnunum, sum skuldi forða fólki at koma umborð, sigur hesin svimjileiðarin.

Men avleiðingin av øllum hesum var, at heilt nógv fólk stóðu eftir á Havnarkei, tá ið Smyril loysti frá landi.

Hann heldur at manningi á Smyrli hevði ikk skyldina av støðuni, men tey stóðu fyrst fyri og tí fingu tey toyggið.

– Tað er leiðslan á Strandferðsluni, sum átti at at tryggja, at slíkt ikki hendi. Var avmarkað pláss, kundu teir selt ferðaseðlar í forsølu. Eitt nú hava øll ítróttarfólkini biðið um pláss frammanundan, tí tað skulu tey eftir skipanini, sum nú er galdandi, so har fóru teir fyrstu 175 ferðaseðlarnir.

Restin av ferðaseðlinum kundi verðið selt í forsølu, sigur svimjileiðarin.

### Stúrdu fyri trupulleikum

Kristian Davidsen, stjóri á Strandfersluni, sigur, at longu fríggjarmorgunin stúrdu teir fyri trupulleikum, tí so nógv tiltøk vóru í Suðuroy

– Tí søktu vit Skipaeftirlitið um loyvi til at taka fleiri ferðafólk við. Men Skipaeftirlitið vildi ikki geva undantaksloyvi til fleiri enn tey 300 ferðafólkini, sum er hámarkið, til bjargingarstøðin er komin umborð aftur.

– Annars er bjargingarútgerð umborð á Smyrli til 500 fólk, men hon er øll í sama stað á skipinum og tí vil Skipaeftirlitið ikki gera undantak.

– Tað harmiliga er, at av einum bólki sum fylgist, eru tað summi, sum fara umborð eftir landgonguni og onnur, sum fara í bilum og sostatt kann avleiðingin vera, at summi í einum bólki sita eftir.

Hann vísir eisini á, at tá ið fólk ikki sleppa við, verða tey rættiliga ágangandi viðhvørt og tað skilir hann væl.

Men sum støðan er, fáa tey onki gjørt, heldur hann. At selja ferðaseðlar í forsølu í slíkum føri sum hesum, hevur hann ikki hugsað um.

Annars heldur hann, at hesin trupulleikin skuldi verðið loystur nú, tí bjargingarstøðin kemur nú umborð aftur.

– Hon kom til landið í gjár og verður sett nú. Arbeiðið at seta hana í, skal vera liðugt í morgin ella hósdagin, so páskasiglingin skuldi verðið bjargað, sigur hann.

# Símum fingið ávaring

**Arbeiðsviðurskiftini á Fornminnissavninum verða meiri og meiri forpestað og nú kennir Símun V. Arge seg rættiliga hóttan í starvinum**

LANDSFORN-FRØÐINGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Símun V. Arge hevur nú eisini fingið ávaring frá Steffen Stumman Hansen, Landsfornfrøðingi og hann hevur samstundis fingið at vita, at hann hellir seg kraftiga upp at eini skrivligari ávaring*

Arbeiðsviðurskiftini á Fornminnissavninum verða meiri og meiri forpestað.

Tann nýggjasti kapittulin í tragikomisku framhaldssøguni um Føroya Fornminnissavn, er, at Símun V. Arge, nú eisini hevur fingið ávaring frá landsfornfrøðinginum, Steffen Stumman Hansen.

Tað hevur prutlað undir lokinum á Fornminnissavninum líka frá fyrsta degi at Stffen Stumman Hansen varð settur í starv sum landsfornfrøðingur.

Men fyri eini viku kókaði grýtan yvir og tað endaði við at 13 av teimum fimtan starvsfólkunum á Fornminnissavninum, sendi mentamálaráðnum eina klagu um Landsfornfrøðingin.

Men Steffen Stumman Hansen svaraði straks aftur og klagaði gamla Landsfornfrøðingin, Arna Thorsteinsson, fyri mentamálaráðnum fyri at øsa starvsfólkið upp ímóti honum.

Men nú er Steffen Stumman Hansen farin eitt stig víðari. Tað hendi í síðstu viku, tá ið hann gav Símuni V. Arge, fornfrøðingi eina ávaring.

Tað var Símun V. Arge, sum starvsfólkið á fornminnissavninum vildi hava til landsfornfrøðing. Hann søkti starvið og setanarnevndin mælti einmælt til at seta hann í starvið.

Hann virkaði eisini sum landsfornfrøðingur, áðrenn starvið var sett.

Men tey, sum hava fylgt við, minnast, at Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í mentamálum, kortini setti Steffen Stumman Hansen í starvið.

### Kennir seg hóttan

Steffen Stumman Hansen vil ikki geva viðmerkingar til innanhýsis viðurskifti á Fornminnissavninum.

Men Símun V. Arge váttar, at hann týsdagin fekk eina munnliga ávaring frá Steffen Stumman Hansen.

Hann sigur, at hann hevur eisini fingið at vita, at hann hellir seg kraftiga upp at eini skrivligari ávaring.

– Tá ið eg fekk tað munnligu ávaringina, fekk eg nevniliga samstundis at vita, at verður tað minsta afturat við mær, fái eg eina skrivliga ávaring.

Hann sigur, at tað er eitt rættiliga álvarsmál at fáa eina munnliga ávaring. Og hóttanin um eina skrivliga ávaring er ikki minni álvarsligt.

– Hetta er onki minni enn ein ávegis uppsøgn, leggur hann afturat og sostatt føli eg meg rættiliga hóttan í starvinum í løtuni, sigur Símun V Arge.

Hann sigur, at hann hevur sent málið til fakfelag sítt, sum er Magistarafelagið, og felagið arbeiðir nú víðari við tí.

Símun V. Arge hevur annars ongar viðmerkingar til viðurskiftini á Fornminnissavninum, soleiðis sum støðan á stovninum er nú.